**Fylgiskjal 1 til avtalu um neyðtilbúgving í sambandi við arbeiðssteðg:**

Fylgjandi verður lagt aftur at stk. 3 í avtaluni um fráboðanarform og fráboðanarfreist:

Partarnir eru samdir um, at ein arbeiðssteðgur í ongum førum má seta lív og heilsu borgarans í vanda, og somuleiðis eigur ein arbeiðssteðgur heldur ikki at føra til, at stór samfelagslig virði fara fyri skeyti.

Tá arbeiðssteðgur kann seta lív, heilsu og samfelagsvirði í vanda, eiga nøkur starvsfólk tí at verða undantikin arbeiðssteðgi.

1. Leiðarar 3 og leiðarar flokkaðir omanfyri hetta kunnu ikki fara í arbeiðssteðg. Ítøkilig meting verður gjørd fyri leiðarar 1 & 2.
2. Í mun til onnur størv, metir leiðslan um og ger av í samráð við álitisfólkið, hvussu nógvum starvsfólki tørvur er á, sbr. nr. 3 niðanfyri. Tá sáttmálin millum partarnar er uppsagdur lata stovnsleiðslur og kommunur Fíggjarmálaráðnum/Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fylgiskjal A, har ásett verður, hvørji starvsfólk verða undantikin møguligum arbeiðssteðgi. Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið senda skjølini víðari til Starvsfelagið, og í seinasta lagi 1 mánað innan sáttmálin gongur út, skal semja vera millum partarnar um fylgiskjal A.
3. Starvsfólk, ið eru undantikin arbeiðssteðgi, eiga bert at átaka sær tær neyðugu uppgávurnar. Endamálið er bert at forða fyri, at vandi ikki stendst fyri lívi, heilsu ella tapi av stórum samfelagsligum virðum. Starvsfólk mugu sostatt ikki átaka sær aðrar uppgávur.
4. Viðkomandi limir hjá Starvsfelagnum, sum fáa arbeiðsboð frá leiðsluni, hava skyldu til at fara til arbeiðis beinanvegin og at fylgja sáttmálanum, sum var galdandi, áðrenn arbeiðssteðgurin var lýstur.
5. Er Starvsfelagið ikki samt við eini avgerð hjá leiðsluni sambært skjali A, kann felagið leggja málið fyri eina nevnd, sum ger av, um undantakið er neyðugt fyri at tryggja, at lív og heilsa borgarans ikki verða sett í vanda, ella fyri at tryggja, at stór samfelagslig virði ikki fara fyri skeyti.
6. Nevndin verður mannað við trimum limum. Fíggjarmálaráðið / Kommunala Arbeiðsgevarafelagið velja ein lim, og Starvsfelagið velur ein lim. Hesir báðir limirnir velja síðani forfólkið. Forfólkið skal hava viðkomandi fakligt innlit og vera óheft. Av tí at Starvsfelagið umboðar nógvar ymiskar fakbólkar er neyðugt, at forfólkið leitar sær fakliga ráðgeving, alt eftir hvørji fakøki skulu viðgerast.
7. Til limirnir hava valt eitt forfólk sambært nr. 4, er forfólkið útnevnt av sorinskrivarinum. Nevndin skal taka avgerð innan 24 tímar, eftir at áheitan sambært nr. 4 er komin frá Starvsfelagnum. Verður nevndin ikki samd, tekur forfólkið avgerð.
8. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna hvør sínum limi í nevndini. Sáttmálapartarnir bera útreiðslurnar av at samsýna formanninum.

9. Ein avgerð sambært nr. 3 kann eftir arbeiðssteðgin leggjast fyri Fasta Gerðarættin.